Skjal 17

## Kristjan Árnason

**Fra:** Elkin Klettheyggj <Elkin.Klettheyggj@krfo.dk>
**Sendt:** 31. august 2018 09:56
**Til:** Almannamálaráðið
**Emne:** VS: Hoyring - Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) við fleiri send til hoyringar
**Vedhæftede filer:** 18-00672 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd ....pdf; 17-00644 Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð.pdf; 17-01034 Lóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin.pdf; 18-00510 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd....pdf; 18-00633 - Javntekstur til ll. um br í ll um eldrarøkt heimatænastu v.m.pdf; 18-00633 - uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatæn....pdf

Kriminalforsorgin skal gera vart við, at man í §§ 49, 50 og 51 í løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, eftir okkara meti ikki hevur tikið hædd fyri, at kriminalforsorgin útfrá §49 í revsilógini hevur heimild, at lata innsettar avsona sín, av rættinum, avsagda fongsulsdóm, aðrastaðni enn í varðhaldinum, hetta vegna ungan aldur ella rúsevninsmisnýtslu. Í Danmark eru tað sosialu myndugleikarnir, ið rinda fyri hetta. Sostætt meta vit, at soleiðis eigur eisini at vera í Føroyum og mæla tí til at nýggja lóggávan loyvir hesum.

Vinaliga

*Elkin Klettheyggj*
*Enhedschef hos Kriminalforsorgen på Færøerne*

KRIMINAL FORSORGEN
Institution Københavns Omegn, Bornholm og Færøerne
Færøerne
100 Tórshavn
Tlf.: +298 663800
www.kriminalforsorgen.dk

**Fra:** Almannamálaráðið <amr@amr.fo>
**Sendt:** 23. juli 2018 11:56
**Til:** Elkin Klettheyggj <Elkin.Klettheyggj@krfo.dk>
**Emne:** Hoyring - Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) við fleiri send til hoyringar

**Til Kriminalforsorgina**

Hervið verða hesi uppskot send tykkum til hoyringar:

- **Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**
- **Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum**

Serliga verður heitt á Kriminalforsorgina um at viðgera §§ 49, 50 og 51 í løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, ið hava ásetingar um støður tá persónar sambært rættarúrskurði verða settir í fyribils ella vardan bústað.

Talan er eisini um áseting, sum hevur til endamáls at veita amboð til at fremja ungsdómssanktiónir.

Freistin at gera viðmerkingar er fríggjadagin 14. september kl. 12 og heitt verður á tykkum um at senda møguligar viðmerkingar til amr@amr.fo

Um spurningar eru, ber til at venda sær til Marjuna Magnussen, deildarstjóra í Almannamálaráðnum á teldupost: marjun.magnussen@amr.fo

Vinaliga
f. Almannamálaráðið
Sólgerð Hjørleifsdóttir, leiðsluskrivari